# Kunning av stovnsleiðarum um tíðarfreistir o.tíl.

Góði stovnsleiðari,

Nú ið 2023 skjótt er farið aftur um bak, ynskir gjaldstovan at kunna teg um, hvussu vit kunna um tíðarfreistir o.a. í sambandi við ársskiftið.

Brúktir verða 3 miðlar í sambandi við kunning: teldubrøv til tín, tíðindir á FSL-portalinum og á www.gjaldstovan.fo – umframt at ymsi kunningarskriv o.a. eru á www.gjaldstovan.fo. Sí leinkini "ársroknskapurin 2023" og "roknskapargóðkenning", sum tú eigur at kunna teg við.

Undir leinkinum "ársroknskapurin 2023" sært tú leinkið "Listi yvir FSL-mánaðarkoyringar Jan. – Des. 2024", har kunnað er um, nær ið tíðarskeið verða latin aftur og roknskaparútskriftir í telduposti sendar út. Sambært yvirlitinum er 21. februar 2024 síðsti dagur, ið stovnarnir kunnu skráseta á fíggjarárið 2023 – síðsta lønarkoyring viðvíkjandi fíggjarárinum 2023 verður helst nakrar dagar undan hesum.

Gjaldstovan fer so hvørt at kunna um, at tíðarskeið verða latin aftur – herímillum eisini um, at síðsta freist at bóka á fíggjarárið 2023 nærkast.

g.v.

Gjaldstovan